# Buldur og brak av motorsúkklum



*Nógvar motorsúkklur verða at síggja í gøtunum leygardagin. Tær hittast á Shellstøðini við Ringvegin í Havn kl 11 leygarmorgunin, koyra runt í Havnini og inn í Eysturoynna, at steðgað verður á Shellstøðini í Gøtudali millum kl 14:30 og 15:30*

**Leygardagin verður buldur og brak av motorsúkklum, sum hittast í Havn fyri at koyra ein túr í Eystur oynna og aftur til Havnar. Væl eydnaða afturvendandi tiltakið kallast Føroya MC-Boogie**

MOTORSÚKKLUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Leygardagin 1. mai verður fyrsta stóra tiltakið fyri motorsúkkluáhugað, sum verður nevnt Føroya MC-Boogie.

Tað eru Føroya-MC og Føroya Ellisakfør, sum skiftast um at skipa fyri, og leygardagin er tað Føroya-MC, sum skipa fyri.

Dentur verður lagdur á, at hetta tiltakið er fyri øll motorsúkkluáhugað.

– Tær nýtist ikki at vera limur í nøkrum felag, tað er bara at møta upp, siga fyrireikararnir.

Vanlia koma nógvar – bæði heilt gamlar og nýggjar súkklur til tiltakið, sum er skipað á tann hátt, at møtt verður við Shell-støðina við Ringvegin í Havn kl 11. Shell er høvuðsstuðul hjá Føroya-MC og bjóða kaffi og okkurt afturvið.

Á Shell-støðini verður greitt frá, hvussu túrurin verður skipaður.

Kl 12 verður farið avstað. Koyrt verður fyrst ein túr gjøgnum býin, síðani verður farið norðureftir. Fyrsti steðgurin verður við Streymin, síðani verður koyrt til Elduvíkar, og eftir ein lítlan steðg verður farið víðari, soleiðis at komið verður til Shell-støðina í Gøtudali umleið kl 14:30. Har verður steðgað í umleið ein tíma.

Á Shell-støðini í Gøtudali verður kaffi at fáa og køkur afturvið um framt onkur stuttleikakapping. Síðani verður koyrt til Havnar – og endar tiltaki við veitslu í Kagganum kl 19.






# Bilar

Nr. 81 • hósdagur • 29. apríl 2004 • 78. árg.

# Nýggjheitir frá Renault

**Ein Renault 4x4 konseptbilur verður í hesum døgum royndarkoyrdur í Frakklandi. Eisini verður ein nýggjur Renault Twingo Space, sum eftir ætlan kemur á marknaðin seinni í ár, royndarkoyrdur**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Renault 4x4 er møguliga ein bilur, sum skal kappast við t.d. Toyota RAV-4, Land Rover Freelander, Honda CR-V ella Nissan X-Trail. Bilurin minnir mest um ein jeep við stórari fríhædd og stórum hjólum.



*Renault 4x4 konseptbilur við stórari fríhædd og stórum hjólum*

**Renault Twingo Space**

Renault Twingo Space, sum bilurin møguliga kemur at eita, kemur væntandi á marknaðin seinni í ár, møguliga sum avloysari fyri núverandi Renault Twingo, sum hevur verið á marknaðinum síðan 1993. Bilurin verður nakað minni enn Opel Meriva.

*Kelda: Bil magasinet*



*Renault Twingo Space verður møguliga navnið á hesum bilinum, sum eftir ætlan kemur á marknaðin seinni í ár*

# Ford Mustang sum í gomlum døgum

**Ford Mustang, ið var ein av heimsins kendastu bilum í 60-unum, kemur eftir ætlan aftur á marknaðin í sama stíli sum tá. Bilurin var fyrstu ferð sýndur alment fram á Detroit Motorshow 2003**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Hesin Ford Mustang Coupé líkist heilt nógv teimum frá 60-unum.*

Tað vísir seg sum at nógvir av teimum gomlu klassikarunum rísa upp aftur. Bilar sum BLMC Mini og fólkavognurin, VW New Beetle, eru dømi um tað.

Nú er ætlanin at ein nýggjur Ford Mustang, sum minnir nógv um tann gamla, ið fyrstu ferð kom á marknaðin fyri 40 árum síðan, skal koma á marknaðin í 2005.

17. apríl 1964 kom fyrsti Ford Mustang á amerikanska marknaðin.

Bilurin verður ein 2+2 coupé við smáum barnasetrum og eisini líkist gamla Mustang innan.

Motorarnir verða ein 4.0 litur V6 við 202 hk og ein 4,6 litur V8 við 300 hk. Seinni kemur ein Cobra útgáva við 400 hk.

Um bilurin eisini kemur til Evropa er ikki heilt víst.